Til lækna í Meksiko

Altsamt fleiri amerikanarar leitað sær suður um markið til Meksiko at leita sær læknahjálp, tí tað er ov dýrt at fara til lækna í USA. Tað er ikki heilt greitt, hvussu nógvir amerikanarar fara um markið í læknaørindum, men ein kanning hjá einum lærdum háskúla í Kalifornia bendir á, at umleið ein millión amerikanarar fara til lækna í Meksiko á hvørjum ári. Tíðindastovan Reuters skrivar um ein mann, sum fór úr USA til Meksiko at fáa sær viðgerð. Har rindaði hann 40.000 krónur fyri viðgerðina. Skuldi hann fingið somu viðgerð heima í USA, hevði rokningin verið 250.000 krónur.

Statsbanki gott hugskot

Í Danmark er tann sosialdemokratiski flokkurin komin við hugskotinum at stovna ein almennan statsbanka, har fyritøkur, sum ikki kunnu fáa lán í teimum vanligu bankunum, kunnu læna pengar. Hugskotið er eftir øllum at døma fallið í góða jørð. Sambært einari meiningakanning hjá kringvarpinum DR siga 47 prosent, at hugskotið um ein statsbanka er gott ella sera gott. Ein lítil triðingur er ímóti, og 13 prosent vita ikki. Ikki óvæntað vísir kanningin, at undirtøkan fyri statsbankanum er serliga stór millum teir sosialdemokratisku veljararnar.

Breið semja um skerjing

21 tinglimir atkvøddu fyri uppskotinum hjá landsstýrinum um at skerja fiskidagarnar í øllum bólkum við 5%. Øll umboðini hjá Tjóðveldi – uttan Heini O. Heinesen – vildu hava munandi størri skerjingar og atkvøddu tískil ímóti uppskoti landsstýrisins

FISKIDAGAR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Umframt eina samtykta skerjing av fiskidøgum í øllum bólkum upp á 5%, hevur landsstýrismaðurin eisini heimild við kunngerð at femja aðrar ásetingar innan fiskiveiði í komandi fiskiári

Mynd: Karstin Vang

Seint í gjár samtykti løgtingið endaliga uppskotið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, um fiskidagar og aðrar tillagingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Landsstýrismaðurin hevði skotið upp at minka um fiskidagarnar í øllum bólkum við 5% fyri fiskiárið 2009/2010. Við í uppskotinum vóru eisini ásetingar um økisfriðingar til tess at verja ungfisk móti trolveiði og ásetingar um størri meskavídd í hjáveiðiposanum hjá trolbátum á landleiðini. Aðrar ásetingar vóru at banna vinnuligari línuveiði innanfyri ein fjórðing úr landi og at línuskip, sum hava loyvi at royna inn á 6 fjórðingar úr landi, nú skulu út um 7,5 fjórðingar.

Ætlanin er, at ásetingarnar um at fáa vinnuliga línuveiði longur út til tess at verja ungfisk, skulu verða galdandi í eitt ár.

Uppskotið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap hevur í seinastuni verið til viðgerðar í vinnunevnd løgtingsins.

Samgongulimirnir í vinnunevndini mæltu løgtinginum til at taka undir við hesi 5% skerjing – og í stórum at fylgja uppskoti landsstýrisins um nevndu ásetingar.

Hinvegin mælti umboð Tjóðveldisins til at skerja fiskidagarnar hjá línuflotanum við 50% og við 20% hjá partrolaraflotanum.

Umboð Sjálvstýrisfloksins í vinnunevndini mælti til, at fiskidagarnir í komandi fiskiári verða teir somu sum í verandi fiskiári.

Breið semja

Undir endaligu avkvøðugreiðsluni við triðju viðgerð í gjár tóku 21 tinglimir undir við at skerja fiskidagarnar við 5% umframt aðrar ásetingar, meðan 6 tinglimir, øll úr Tjóðveldi, atkvøddu ímóti. Einasti tinglimur úr Tjóðveldi, sum tók undir við skerjingini, ið Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur skotið upp, var Heini O. Heinesen.

Orsøkin til, at seks av umboðum Tjóðveldisins atkvøddu ímóti, var, at flokkurin bæði í uppskoti á løgtingi og í viðgerðini í vinnunevnd løgtingsins helt fast um nógv størri skerjingar av fiskidøgum, sum fiskifrøðiliga tilráðing eisini hevur mælt til.

Heini er enn einaferð maðurin, sum "torir" at venda sær ímóti sínum egnu, ið annars eru vorðnir so "modernaðir", at teir vilja fylgja fiskifrøðiligu ráðgevingini hjá Havstovuni fult og heilt.

Aðrar ásetingar

Samtyktin í løgtinginum gevur eisini landsstýrismanninum heimild at koma við kunngerðum um økisfriðingar til verju av ungfiski og aðrar reguleringar við eitt nú meskastødd í hjáveiðiposanum hjá trolbátum á landleiðini.

Aftrat hesum kann landsstýrismaðurin við kunngerð banna vinnuligari línuveiði innanfyri ein fjórðing úr landi, eins og hann kann fremja nýggjar ásetingar um, at línuskip skulu longur út at seta.

Endamálið við hesum er at verja ungfisk, og kann landsstýrismaðurin gera hesar ásetingar galdandi í fyrstu syfti í eitt ár.

Aftrat uppskotu friðingunum fyri hjá landsstýrismanninum – ávikavist úr Mykinesi og Fugloyarbankanum, er í samtykta uppskotinum eisini talan um permanenta friðing av einum øki á Munkagrunninum.

Hesar friðingar hava til endamáls at verja smáupsa móti trolveiði.

Jacob nøgdur

FISKIDAGAR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, sigur, at hann er væl nøgdur við endaligu samtyktina á tingi, sum næstan er identisk við upprunaliga uppskotið hjá landsstýrinum um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

- Endaliga samtyktin liggur – um ikki heilt – so rættiliga nær mínum uppskoti um, hvussu fiskiveiðan skal skipast í komandi fiskiári.

Hann sigur, at fiskimálaráðið nú fer at samskifta við vinnunevndina um, hvussu fram skal farast við øðrum ásetingum, ið skulu fremjast við kunngerðum, eitt nú teimum friðingum, ið skulu fremjast, umframt hvussu vinnuliga veiðan skal skipast á innastu leiðunum – eitt nú hjá vinnuligum útróðrarbátum við línu og hjá línuskipum, ið ætlandi skulu longur út at royna.

Jacob Vestergaard vísir á, at tá ætlanin nú er at taka vinnuliga línuveiði hjá útróðrarbátum út um ein fjórðing, er talan ikki um at banna snellu-og snørisveiði innari.

- Nei, tað haldi eg ikki, vit eiga at gera, leggur hann aftrat.

Samgonguumboðini í vinnunevndini hava heitt á landsstýrismannin um sum skjótast at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, so vinnan fær so støðugar karmar sum gjørligt at virka undir.

Hetta arbeiði skal verða tøkt, tá løgtingið í august 2010 skal áseta fiskidagar og friðingar fyri fiskiárið 2010/ 2011.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur eisini sett fólk at kanna, hvussu brúksskylda kann áleggjast teimum, sum fáa fiskidagar. Hetta arbeiðið skal vera liðugt 1. november í ár.